**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 15/2018: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri september 2018**

Bárður á Steig Nielsen og Bill Justinussen, vegna ávikavist Sambandsflokkin og Miðflokkin, hava lagt málið fram 10. september 2018 og eftir 1. viðgerð 27. september, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2. og 4. oktober 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í heilsu- og innlendismálum, Sirið Stenberg.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Ruth Vang, Bárður Nielsen, Djóni Nolsøe Joensen, Pauli Trond Petersen og Bill Justinussen) mælir til at taka undir við uppskotinum, við tí broyting at 17 mió. kr. verður lækkað niður í 14 mió. kr.

Nevndin er kunnað um, at ein meirjáttan á 14 mió. kr. kann tryggja, at viðgerð á Landssjúkrahúsinum og serviðgerð uttanlands kann halda fram ótarnað. Hetta merkir eisini, at henda játtan kemur í staðin fyri umbidnu eykajáttan í lm. nr. 18/2018 (á konto 11.20.3.04).

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

**B r o y t i n g a r u p p s k o t**

# § 11. Heilsumál

## B. Játtanir

| | | | Útr. | Innt. |
|---|---|---|---|---|
| | | | - Tús. kr. - | |
| **11.20.3.** | **Sjúkrahúsverkið** | | | |
| 20.3.04. | Landssjúkrahúsið (Rakstrarj.) | J: | 672.042 | - |
| | | **EYJ:** | **14.000** | **-** |

Við hesi broyting tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Jacob Vestergaard og Kristin Michelsen) tekur ikki undir við hesum málinum, tí at minnilutin metir tað vera rættari at taka undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum í heilsumálum, sum eisini hevur biðið um eykajáttan til heilsuverkið.

Minnilutin tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 4. oktober 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Ruth Vang<br>formaður | Bárður Nielsen<br>næstformaður | Djóni Nolsøe Joensen |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |